# Andreas í Skúlanum 80 ár



Ein reyður Simca Étoile stendur við fullum speedi og roynir at sleppa um krappa svingið niðan fyri barnaheim mítt eina ferð fyrst í 1960'unum. Í bilinum situr ein álvarsfullur maður við kraftigum brillum og trýstir av dýrastu makt á speedaran, og loksins kemur hann um trupla hornið og heldur kós sína heimeftir móti skúlanum.

Ja, soleiðis sá eg Andreas Thomsen á fyrsta sinni. Vit skuldu upp í týskum í preliminerskúlanum í Fuglafirði hendan dagin. Komin inn til prótvøkuna situr maðurin í Simca-bilinum har. Hann tóktist blíðsníðaður, spurdi um okkurt, men lurtaði fyri tað mesta, meðan góði týsklærari okkara, Jóhan Ellendersen, spurdi .... og so takkaði hann kurteisliga fyri avrik mítt, meðan eg bangin fór útum at bíða eftir dóminum. Avrikið mundi hava verið hampiligt, tí løtu seinni kundi eg fara heim við einum reinum ug, sum eg oftani seinni ikki kundi lata vera við at binda saman við ein spolandi reyðan Simca-bil í svinginum niðan fyri hús okkara.

At sami Andreas Thomsen skuldi gerast ein av bestu vinum mínum og seinni okkara, tá ið eg fekk konu og børn, visti eg ikki.

Men soleiðis bleiv.

Seinni fekk eg at vita, at tú, góði Andreas, longu heimanífrá bleivst róptur Andreas í Skúlanum, og skúlin var alt lív títt. Á Tvøroyri, í Vestmanna, á Glyvrum, eitt skifti niðri og síðan til Víkar, har tú líka sum fórst fyri at taka ferðina av stórskúlalívi tínum, áðrenn tú fórst at njóta títt otium í heimbygdini Oyndarfirði. Allastaðni bleivst tú kendur sum ein av teimum skúlameistarunum, sum kanska var eitt sindur meira kontantur við krøvunum til skúlan, enn nýggja rákið innan modernaða frálæru legði upp til. Allastaðni fekst tú eisini góðar vinir, sum fleiri eisini so við og við blivu vinir mínir og okkara

Vit hava nú í skjótt hálvhundrað ár kenst og eru komnir til hvønn annan og hava saman við mongu góðu vinfólkum okkara verið á ferð úti í heimi, har kosmopolitturin í tær rættiliga hevur kent sítt heimabeiti, sum vit onnur mangan hava notið gott av, og so hevur stásiliga heim títt, Perlan í Oyndarfirði, altíð átt rúm fyri okkum øllum hesi mongu ár. Her hugsi eg, at góða vinarlagið rættiliga hevur víst sítt virði, og fólk mítt er vorðið fólk títt, og vinir mínir eru vorðnir vinir tínir, soleiðis at vit í felag hava átt eitt ríkidømi at gleðast um hjá hvørjum øðrum bæði burturi í stóruverð og her heima á klettunum.

Góði vinur tín – og okkara - Asger Møller, sum nú ikki meira er millum okkum, rópti teg ikki av ongum fyri "Unge Thomsen", líka til hann andaðist fyri stuttum - yvir hálvfems ára gamal.

Hetta ungdommiliga lyndi títt, sum kanska ikki kemur líka væl til sjóndar fyri øll, hevur millum vinir gjørt teg til tann okkara, sum mest tíðarleysur ert farin um hesi skjótt fimti árini, vit hava kenst. Títt intellekt hevur verið av tí slagnum, sum rúm hevur havt fyri einum blandaðum vinarskara, sum er komin og farin um gátt tína við eini kenslu av, at gott vinarlag væl fær verið uttan at hava fyri neyðini at blíva tanlað og slitið uppá í heilum.

Tú hevur í øll hesi ár, vit havt kenst, verið hann, sum var har, tá ið á hevur staðið við tínum positiva áhuga, tú hevur verið á ferð við okkum um lond, har heimspekiliga vitan tín hevur loyst okkara gordisku knútar, tú hevur eisini á heimabeitinum verið hann, sum sat við borð okkara, tá ið okkurt var at gleðast ella syrgja um .... og nú fert tú, dagstevnt tann 28. mei, um tey áttati uttan yvirhøvir nakrantíð at hava verið gamal.

Tí fara vit á kempualdardegi tínum, sum tú hevur valt at halda hjá góðum vinum burturi í heimi, at ynskja tær hjartaliga tillukku, og at tú framhaldandi enn í mong ár heldur á at vera tíðarleysi vinur okkara.

**Vit á Bøvegi 16 … og mong við okkum**

# Jógvan Sundstein 75 ár



Sunnudagin 25. mei fylti Jógvan Sundstein 75 ár. Jógvan var í eina fjórðings øld í politiska andglettinum umframt, at hann var fyrsti føroyingurin, sum í Føroyum arbeiddi sum ríkisgóðkendur grannskoðari.

Jógvan Sundstein er havnarmaður. Foreldrini vóru Hanna Jensen (á Dul) og Hans Sundstein, sum í mong ár var sjómansskúlalærari. Tey fingu seks børn. Jógvan var elstur, og so eru fimm systrar: Margretha (1935), Agnas (1937), Elisabeth (1939), Hanna (1940) og Marjun (1947). Margretha býr niðri, og hinar búgva í høvuðsstaðnum.

Beinanvegin, tá ið Jógvan var liðugur við realskúlan, fekk hann ferilin av, hvussu turbolent tað kann vera í føroyska samfelagnum. Í 1952 gjørdist hann næmingur í Sjóvinnubankanum, sum hevði verið og meðan Jógvan var í bankanum framvegis var í brotastjógvum. Eftir bankaútbúgvigina flutti Jógvan til Keypmannahavnar, har hann í 1958 leyk prógv í HD í roknskapi, og fýra ár seinni tók hann grannskoðaraprógv. Í 1963 varð hannn løggildur grannskoðari.

Í 1964 fór Jógvan Sundstein undir egið grannskoðaravirki í Havnini. Eitt skifti arbeiddi hann saman við Paula Ellefsen, og nógvu tey seinastu árini var tað saman við Jógvani Amondson og øðrum, sum nú eiga grannskoðaravirkið INPACT. Millum aðrar almennar uppgávur, sum Jógvan hevur røkt eru formanssessurin í Føroya Handilsskúla (1972-1989) og álitissessin sum semingsmaður.

Jógvan er føddur í 1933. Hann minnist sostatt væl krígsárini, og longu tá var hann áhugaður í samfelagslívinum og ikki minst tjóðskaparstríðnum. Hann var tíðliga sannførdur fólkafloksmaður, og í 1970 var hann á listanum hjá Eysturoyar fólkafloksfelag til løgtingsvalið. Fleiri útskiftingar vóru á tí valinum, og Jógvan var millum nýggju løgtingsmenninar. Hann umboðaði eysturoyingar í tvey valskeið, og frá 1978 og fram til 1994, tá ið hann ikki stillaði uppaftur, var Jógvan valdur á fólkaflokslistanum í Suðurstreymi.

Eftir ársskiftið í 1975 varð samgonga skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Talan var um nýtt samstarv, og Jógvan var saman við Atla Dam og Finnboga Ísakson arkitektur aftanfyri hesa samgonguna, sum setti djúp spor eftir seg á so mongum økjum.

Í hesum samgonguskeiðnum og eisini í áttati árunum mundi Jógvan hava møguleika at gerast landsstýrismaður. At hann rak egið virki, og stóri áhugin og virðingin fyri løggávuvaldinum mundu vera orsøkir til, at Jógvan helt fram sum tingmaður. 1980-84 og aftur eitt skifti í 1988-89 var Jógvan løgtingsformaður.

Jógvan hevur onkuntíð tikið til, at størsta styrkin hjá honum er, at hann er so bjartskygdur ella optimistiskur, og at hetta eisini er hansara størsti veikleiki. Tá ið Jógvan í 1989 gjørdist løgmaður var neyðugt bæði at vera realistiskur og optimistiskur. Jógvan var stjórnarleiðari í tveimum samgongum 1989-91. Landið var í svárari kreppu, og tað sást aftur í samgongustevinum millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin. Tann samgongan sat frá 18. januar og fram til 22. juni í 1989. 22. juni í 1989 varð samgonga skipað millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin. Tann samgongan helt til 15. januar í 1991.

Eftir valið í november 1990 høvdu Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin einsamallir meiriluta í løgtinginum. Kemiin hevði altíð passað væl millum Jógvan og Atla Dam, sála. Áralagið var gott millum fíggjarmálaráðharran Jógvan Sundstein og Atla Dam løgmann í ivaleyst mest turbolenta politiska tíðarskeiðnum í Føroya søgu.

18. januar í 1993 legði Atli frá sær sum løgmaður, og longu tríggjar mánaðir seinni skrædnaði samgongan, og harvið var skeiðið hjá Jógvani í landsstýrinum liðugt. Løgtingsval var 7. juli í 1994, og tá stillaði Jógvan ikki uppaftur.

Jógvan er giftur Lydiu fødd Marsten og ættað úr Klaksvík. Tey búðu í mong ár úti í Grønlandi, men fyri fáum árum síðani fluttu tey til Danmarkar. Tey búgva í Slagelse, har dótturin, Ruth, býr. Lydia og Jógvan eisini tveir synir – Hans Paula og Eivind – sum báðir búgva á flatlondum.

Hóast tey búgva í Danmark, so fylgir Jógvan framvegis væl við í føroyskum samfelagslívi, og ikki so sjáldan ber hann síni sjónarmið fram her í blaðnum.

**J**

**Dagurin**
**28. mai. Vilhjálmur**, deyður í 812. Hertogi í Gascogne í Fraklandi. Var ein av kempunum hjá Karlamagnusi keisara. Tað er um hann, at Sjóvarbóndin yrkti kvæðið Viljorm Kornus. Hann fór í kleystrið inn at bøta sínar syndir. Seinni legði hann út aftur í herstríð, men halgisøgan sigur, at hann á gamalsaldri aftur fór í kleystrið, sum hann sjálvur hevði grundað. Upprunaliga týskt navn, vilji og hjálmur.